## Bíligari koyring

Leiðslan í teimum báðum tunnilsfeløgunum hevur nú gjørt av at lække prísin fyri at koyra ígjøgnum Vágatunnilin og Norðoyatunnilin 10 prosent. Lækkingin stavar frá, at Løgtingið stutt fyri nýggjár játtaði 5,4 mió. krónur til at lække gjaldið fryri at koyra ígjøgnum undirsjóvartunlarnar. Dávur Reinert Hansen, stjóri í teimum báðum tunnilsfeløgunum, sigur við Útvarpið, at ætlandi kemur príslækkingin í gildi um einar fjúrtan dagar.

## Ólógligar alistøðir

Ein kanning hjá donsku umhvørvismyndugleikunum hevur avdúkað, at tær flestu alistøðirnar uppi á landi í Danmark eru ólógligar, og at tær ikki hava tey neyðugu loyvini til at lata antibiotika og onnur evni út í áir og løkir. Vinnan sjálv ásannar fyri Ritzau, at ruðuleiki valdar á økinum, tí sum er er virksemið hjá 80 prosentum av alistøðunum á landi ólógligt. Politiska andstøðan sigur, at støðan er einki minni enn ein gøla.

# Bankaði andlitið í kantstein



**Fullur, avbardur og uttan vit varð ein ungur maður innlagdur á intensiva deild sunnumorgunin, eftir ein óvanliga ógvusligan bardaga í Tórsgøtu**

VAKTHAVANDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Aftur hetta vikuskiftið hava vit verið vitni til óvanliga ráan harðskap millum fullar menn. Hesaferð í Tórsgøtu, har tveir mans høvdu eitthvørt trætumál, sum teir mettu átti at verða loyst við harðskapi.

Sambært løgregluni fóru teir báðir menninir til hendurs inni á einum vertshúsið um hálvgum fimmtíðina sunnumorgunin. Teir vórðu beindir útum, har tvístøðan helt fram. Men bardagin tók eina vend, tá tann yngri maðurin datt, meðan hin helt fram at buka hann. Millum annað við at banka andlit hansara niður í ein kantstein á gongubreytini einar 6-8 ferðir. Ungi maðurin misti vitið, og var enn uttan vit, tá løgreglan og sjúkrabilurin komu á staðið. Maðurin varð sendur á Landssjúkrahúsið, har hann varð innlagdur á intensivari deild.

Nógv vitni vóru til tilburðin, og gerningsmaðurin, sum er síðst í tjúgunum, er longu handtikin. Løgreglan hevur prátað við fleiri vitni, og kanningar hava verið á staðnum. Málið verður mett sum uppklárað, og maðurin, ið framdi harðskapin, verður helst skuldsettur fyri grovan harðskap. Sambært revsilógini grein 245, ið umrøður grovan harðskap, er revsiramman í fýra ára fongsul.

# Stjólu bát av Oyrargjógv

**Fýra eysturoyingar millum 15 og 18 ár kunnu vænta sær eina heilsan frá ákæruvaldinum, eftir at teir fríggjamorgunin um hálvgum sjeytíðina stjólu ein árabát av Oyrargjógv.**

VAKTHAVANDI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Meðan teir fóru skúmandi úteftir fjørðinum, komu eigararnir av bátinum koyrandi oman á atløguplássið, har ein annar bilur stóð. Menninir í bilinum vóru miðvingar, sum vóru á veg á fjall á Slættanesi, tá teir varnaðust at báturin var horvin. Eisini hildu teir seg síggja bátin norðantil á fjørðinum, so teir gjørdu ikki matari enn at ringja til løgregluna. Haðani var MRCC boðsent, og leiting sett í verk. Millum annað varð tyrlan gjørt til reiðar, umframt at ein maskinbátur hjá sjóbjargingartænastuni var sendur út. Dreingirnir í árabátinum vóru ikki staðkendir og róku inn móti Vestmanna fyri síðani at venda út aftur og reka norðaneftir fjørðinum. Har fekk MRCC fast á árabátin, og dró hann inn á Oyrargjógv.

Sambært vakthavandi á politistøðini verða dreingirnir skuldsettir fyri stuldur, og helst verður eitthvørt endurgjaldskrav reist móti teimum. Teir vórðu leyslatnir beinanvegin.

Ført hevur verið fram, at tað kann gerast teimum kostnaðarmikið, av tí at tyrlan eisini varð boðsend. Men sambært leiðaranum hjá MRCC, Jóhan J. Jacobsen, hevur tað ikki verið vanligt at krevja endurgjald í slíkum førum.

- Vit eru ein tænasta, sum altíð skal vera til reiðar. So hóast tað sjálvsagt eru ávísar útreiðslur í sambandi við eina leiting, eisini tá báturin er stolin, so er hetta ikki nakað vit tosa um, sigur Jóhan J. Jacobsen. Hann staðfestir í hesum sambandi, at orsøkin til, at tey ikki krevja endurgjald er, at fólk ikki skulu halda seg aftur at venda seg til teirra.

# Reproz vann fimm av níggju Kolum

**Fríggjadagin var tiltakið "Ársins lýsingar Kolan 2007" hildið í Havnar Bio í Havn. Tað er Vinnuvitan, sum saman við Reklamufelagnum skipar fyri tiltakinum. Sansir gjørdist nummar 2 við tveimum kolum, meðan Petur&Petur og Krea fingu hvør sína**

REKLAMUVINNAN
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Havnar Bio var fríggjadagin karmur um tiltakið "Ársins lýsingar Kolanan 2007", sum Vinnvitan skipar fyri saman við Reklamufelagnum. Hetta er annað árið, at skipað verður fyri hesum tiltakinum – sum fyrireikararnir ætla skal vera afturvendandi ár eftir ár

Í fyrra umfarinum fríggjadagin vórðu sjey vinnarar funnir, meðan tveir teir síðstu vórðu avdúkaðir seinni um kvøldið. Hesir vóru "Lýsingaherferðir" og "Fólksins val", har almenningurin hevur kunnað atkvøtt umvegis sms.

Endaligu vinnararnir eru hesir:

**Fyri lýsingarherferðir: EITT er allastaðni**
Lýsingarstova: Reproz
Lýsari: EITT

**Fyri fólksins val: Navnaskiftið hjá Eik**
Lýsingarstova: Petur & Petur
Lýsari: Eik Banki

**Fyri prentlýsingar: Flákra til øll grannalondini.**
Lýsingarstova: Sansir
Lýsari:Atlantic Airways

**Fyri grafiskt design: Halló! Brot úr einum fjarskiftandi alheimi**
Lýsingarstova: Sansir
Lýsari: Føroya Tele

**Fyri sjónvarps- og biolýsingar: EITT er allastaðni**
Lýsingarstova: Reproz
Lýsari: EITT

**Fyri Almannagagnslýsingar: Virkin og virðismikil**
Lýsingarstova: Reproz
Lýsari: Javni

**Fyri uttanduraprentlýsingar: Ymisk lán til ymiskan tørv**
Lýsingarstova: Reproz
Lýsari: Føroya Banki

**Fyri fjølpost: bíleggingarseðil frá hvonn**
Lýsingarstova: Krea
Lýsari: hvonn brasserie

**Fyri útvarpslýsingar: EITT er allastaðni**
Lýsingarstova: Reproz
Lýsari: EITT

Lýsingarfyrtøkan Reproz gjørdist stóri vinnarin á Koluni 2007 við fimm vinningum út av níggju. Síðani átti Sansir tvey fyrstapláss, meðan Petur & Petur og Krea vunnu hvør sína Kolu.

Um 100 luttakarar vóru við á Koludegnum fríggjadagin umboðandi fyrst og fremst lýsingarvinnuna, men eisini úr hinum vinnunum, sum hava samstarv við lýsingavinnuna.

Tað var Vinnuvitan, sum skipaði fyri Koluni 2007 í samstarvi við Reklamufelagið.